## Heiðraðu Enniberg

Reiðaríið hjá Ennibergi hevur fingið eina heiðursplátu, tí trolarin hevur latið besta frysta flakið til bretska marknaðin. Mortan Johannesen, reiðari, sum var í Bretlandi og tók ímóti heiðursgávuni, sigur við Dimmalætting, at reiðaríið er við í einum felagsskapi hjá fiskekeyparum og reiðarum í Bretlandi, Noregi, Íslandi og Føroyum, og at hesin felagsskapur skipar fyri kapping um besta fiskin. Í fjør fekk JFK sama heiður fyri fyri fisk frá Skálabergi.

## Fáa ikki rogn

Hóast prísurin á rognum er óvanliga høgur í ár, fær rognavirkið Kovin í Sandavági ikki nóg mikið av rognum frá føroyskum skipum og bátum. Í gjár keypti Kovin seks tons av toskarognum fyri 22 krónur fyri kilo, og tað er millum tríggjar og fýra krónur oman fyri prísin fyri einum ári síðani. Men hóast tann góða prísin fær Kovin ikki nóg mikið av rognum, tí ov lítið kemur upp á land, og tí noyðist virkið at innflyta rogn úr øðrum londum.

# Hótta við at rýma

**Miðflokkurin umhugsar av álvara at taka seg úr arbeiðnum í nevndini, sum skal virka fyri størri kvinnuleikluti í politikki**



*Tað er nógv sum bendir á, at umboðið hjá Miðflokkinum í demokratia fer at taka seg úr og vit kundu ikki funnið upp á at valt ein nýggjan nevndarlim, sigur Jenis av Rana*

JAVNSTØÐA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hetta liggur so langt frá okkum, at alt bendir á, at vit verða ikki við meir.

Jenis av Rana sigur, at hendir tað, at Miðflokkurin ein av næstu døgunum tekur seg úr nevndini, sum skal arbeiða fyri øktum kvinnuleikluti í politikki, skal tað ikki undra nakran.

Tað er Hjørdis Háberg Petersen, sum umboðar Miðflokkin í nevndini og ein av næstu døgunum, verður gjørt av um hon fer úr Demokratia, sum nevndin eitur.

Formaðurin í Miðflokkinum sigur orsøkin til at Miðflokkurin umhugsar støðu sína í Demokratia, er tí, at nevndin er við í einum tiltaki altjóða kvinnudegnum, har ætlanin er at velja ársins kvinnu.

Har eru tvey uppskoti fyri teirra arbeiðið at fáa kynsligan samleika við í 266 b í revsilógina.

– Tiltakið sum so leggja vit okkum ikki út í, men vit vilja undir ongum umstøðum vera við til at kjósa ársins "grein 266 b drotning", sum tjóðveldismaðurin Tórbjørn Jacobsen so beinrakið kallaði tað í tinginum nú ein dagin.

– Eitt er at stuðla einum slíkum tiltaki. Men tað er ódámligt, at almennir pengar verða fluttir Kvinnu til at fyriskipa ein tiltak, har ein partur er so langt burtur frá Miðfloksins politikki sum yvirhøvur hugsar kann.

### Velja ongan aftur

Demokratia nevndin er vald eftir eini Løgtingslóg, at hvør flokkur hevur sítt umboð í nevndini. Tí er tað ein spurningur um tað ber til hjá einum einstøkum flokki at taka seg aftur.

– Vit skulu tosa við okkara umboð í nevndini, so fáa vit at síggja. Men nógv talar fyri, at hon fer at taka seg úr nevndini.

– Og vit kundu ikki funnið upp á at valt eitt annað umboð fyri Miðflokkin, sigur Jenis av Rana.

Við Útvarpið í gjárkvøldið segði Hjørdis Háberg Petersen, at hon umhugsaði støðuna, tí at velja eina ársins kvinnu, sum hevur verið við til at fáa kynsligan samleika við í grein 266 b, kann Miðflokkurin undir ongum umstøðum góðtaka.

Men hon vísti samstundis á, at Demokratia hevur ikki verið við til at leggja uppskot inn til ársins kvinnu.

Eyðgunn Samuelsen, forkvinna í Demokratia, heldur, at tað hevði verið ótrúliga spell, skuldi tað hent, at Miðflokkurin tekur sítt umboð úr nevndini, tí partapolitikkur og politisk stríðsmál verða ikki viðgjørd í nevndini. Hon heldur eisini, at nevndararbeiðið hevur gingið væl og tey hava verið samd um tey tiltøk, tey hava sett í verk. Tí heldur hon, at tað hevði verið harmiligt, skal eitt tiltak, sum nevndin onki hevur við at gera, seta fót fyri nevndararbeiðnum.

# Standa fast við sítt

**– Vit hava tosað um støðuna og vit halda framvegis, at tað er rætt at vera við í tiltakinum á kvinnudegnum, sigur Eyðgunn Samuelsen, forkvinna í Demokratia**

KVINNUDAGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Vit hava tosað um málið, men vit halda ikki, at tað er nøkur orsøk til at broyta støðu.

Eyðgunn Samuelsen er forkvinna í felagnum Demokratia, sum fer at skipa fyri 8. mars tiltaki á Hotel Føroyum á altjóða kvinnudegnum 9. mars, saman við Kvinnu.

Tiltakið kostar Demokratia góðar 40.000 krónur.

Politikarar úr ymsum herðashornum hava hvassliga átalað, at peningur frá eini almennari nevnd verður brúktur til tiltakið.

Atfinningarnar eru serliga, at atgongumerkini kosta 1000 krónur. Men enn verri er tað, at á tiltakinum skal ársins kvinna veljast. Fimm uppskot eru til ársins kvinnu og grundgevingarnar fyri tvey av uppskotunum, er at tey hava talað fyri, at grein 266 b í revsilógini varð broytt, so at hon eisini skuldi umfata kynsligan samleika.

### Standa við sítt

Men atfinningarnar fáa ikki Demokratia til at bakka.

Nevndin hevði fund í gjár, har málið var til umrøðu.

Eyðgunn Samuelsen leggur dent á, at hetta er ein fundur, sum er avtalaður langt síðani og hann hevði sostatt onki við politisku atfinningarnar at gera.

Hinvegin er tað eyðsæð, at málið varð umrøtt, nú tað hevur fylt so nógv í almenna kjakinum seinastu dagarnar.

Men Eyðgunn Samuelsen staðfestir samstundis, at onki er broytt.

– Demokratia er framvegis við í tiltakinum, sigur hon.

Men hon leggur dent á, at nevndin hevur onki at gera við tann partin av tiltakinum, sum hevur við ársins kvinnu at gera.

– Hetta er ikki okkara borð. Hendan partin av tiltakinum vistu vit onki um, tí hetta er eitt tiltak, sum blaðið Kvinna sjálvt skipar fyri. Vit eru ikki við at velja ársins kvinnu og tá ið vit gjørdu av at vera við, vistu vit onki um, hvør var í uppskoti.

– At velja ársins kvinnu er ikki okkara uppgáva og tað hava vit onki við at gera, sigur hon.

Hon sigur, at einasta orsøk til, at Demokratia er við í tiltakinum, er, at tær, sum halda fyrilestrar eru kvinnur, sum veruliga hava flutt mørk og at tað tí kann vera ómetaliga kveikjandi fyri framhaldandi arbeiðið hjá Demokratia at hoyra, hvat tey hava gjørt í øðrum londum fyri at eggja konufólki at halda seg framat.

Men ásannar kortini, at tað er óheppið, at Demokratia verður nevnt í sambandi við ársins kvinnu, serliga tá ið eitt hitt størsta politiska stríðsmálið í longri tíð, er drigið upp í valið.

Men hon heldur fast um, at tann partin av tiltakinum hevur Demokratia onki við at gera.



*– Vit halda framvegis, at tað er rætt at stuðla kapasitetum sum hesum at koma til Føroya at greiða frá, men vit eru ikki við til at velja ársins kvinnu, sigur Eyðgunn Samuelsen*